# Páska-stevnur kring landið

Eitt av føstu tiltøkunum í kirkjum og samkomum eru tær sonevndu páskastevnurnar.

Her verður givið eitt yvirlit yvir nakrar teirra:

**Missiónshúsið í Porkeri**
Í døgunum frá 21. til 25. apríl verður páskastevna í Missiónshúsinum í Porkeri.

**Passiónsvika í Lívdini**
**Hoyvík:** Hesa vikuna og heilt fram til páskadag verður høvið til eina autentiska og kreativa uppliving av lívi og læru Jesusar vikuna áðrenn deyða og uppreisn hansara.

Á skránni hesar dagarnar eru hugleiðingar, upplestur, lovsangur, framførslur, drama, myndlist og annað.

Henda serliga passiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 20:30, tá evnið er Passión Jesusar fyri Guds fólki, tá hann grætur yvir Jerusalem.

Páskadag verður evnið um passión Jesusar fyri tí æviga lívinum á skránni, har serligur dentur verður lagdur á uppreisnina.

Meiri fæst at vita um skránna við at vitja heimasíðuna hjá samkomuni www.livdin.fo.

# Páskavøka við sálmasangi

**Glyvrar:** Leygarkvøldið 23. apríl kl. 20 verður sonevnd PÁSKAVØKA í Glyvra kirkju við upplestri, sálmasangi og kórsangi.

Sungnir verða sálmar, ið hoyra til páskaaftan, tá Kristus fór niður til heljar, eins og tað verður sagt í trúarjáttanini. Her kann nevnast mæta yrkingin eftir Grundtvig "Á kvøldi varð dukað á helvitis grind", ið Hans Dalsgaard hevur týtt.

Umframt skriftlesturin verður eitt brot lisið úr páskaprædiku eftir grikska kirkjufaðirinum Johannes Chrysostomos, ið livdi frá 345 til 407 eftir føðing Krists. Kór Glyvra kirkju fer at seta dám á páskavøkuna. Kórið syngur undurfagra "Ave verum corpus" eftir Mozart.

Lagt til rættis: Snorri Brend.

# Vónarinnar hátíð



*Kjartan Stakksund av Eiði er fastur skribentur í blaðnum, til tær stóru høgtíðirnar*
Mynd: Jens Kristian Vang

**Jesu uppreisn**
**v1** Men eftir hvíludagin, tá ið tók at lýsa av fyrsta degi í vikuni, komu Maria Magdalena og hin Maria út at hyggja eftir grøvini. **v2** Og sí, tá varð landskjálvti mikil, tí at eingil Harrans kom niður av himli og steig fram og velti steinin frá og setti seg á hann. **v3** Men útsjón hansara var sum snarljós, og klæði hansara hvít sum fonn. **v4** Men vaktarmenninir skulvu av ræðslu fyri honum og vórðu sum deyðir. **v5** Men eingilin tók til máls og segði við kvinnurnar: »Tit mega ikki ræðast! Tí at eg veit, at tað er eftir Jesusi, hinum krossfesta, tit leita. **v6** Hann er ikki her, tí at hann er risin upp, sum hann hevur sagt. Komið higar og síggið staðin, har sum Harrin lá! **v7** Og skundið tykkum og farið og sigið lærusveinum hansara: »Hann er risin upp frá deyðum; og sí, hann fer undan tykkum til Galileu; har skulu tit síggja hann!« Sí, eg havi sagt tykkum tað.« **v8** Og tær fóru í skundi burtur frá grøvini við ótta og miklari gleði, og tær runnu at bera lærusveinum hansara boð um hetta. **v9** Og sí, Jesus kom ímóti teimum og segði: »Heilar og sælar!« Men tær fóru til hansara og fevndu um føtur hansara og tilbóðu hann. **v10** Tá segði Jesus við tær: »Tit mega ikki ræðast! Farið og boðið brøðrum mínum, at teir skulu fara avstað til Galileu, og har skulu teir síggja meg.«

(Matteus 28,1-10)

Nú páskirnar standa fyri durum, og vit skulu aftur hoyra tann sigursæla boðskapin, sum ber okkum boð um at lívið hevur sigrað á deyðanum, at deyðin ikki longur er eitt punktum, men at hann er byrjanin til eitt ævigt lív heima hjá Gudi. Hetta kann ein og hvør ogna sær við trúgv á Jesusar fullgjørda verk á Golgata.

Tað er jú tað sum vit hava hoyrt um í føstuni, hvussu Jesus var viðfarin fyri okkara skuld, har hann til síðst var hongdur uppá krossin á Golgata, negldur gjøgnum hendur og føtur fyri at keypa okkum leys frá ævigari glatan.

Hetta var prísurin sum Gud mátti gjalda fyri okkum, eitt dýrt loysigjald kunnu vit siga; men Gudi havi lov fyri at Jesus ikki var liggjandi í grøvini, - nei, hann sprongdi deyðans leinkjur; hann er sigurshetjan frá Golgata; hann steig út úr grøvini páskamorgun okkum til æviga rættvísi.

Tí kunnu vit av røttum siga hvør við annan: Gleðiligar páskir í Jesu navni.

Eg vil hervið enda við einum páskasálmi, sum eg havi yrkt til páskirnar 2011.



## *Páskasálmur*

(Lag: Lat hurðar upp, Bf 256/DK 144)

*1. O, sæla páskamorgunstund*
*tá helviti, tað skalv í grund;*
*tí frelsarin upprisin var,*
*hann allar heimsins syndir bar.*

*2. Eg Jesu-navnið prísa vil,*
*at hann her legði lívið til;*
*av kærleika til syndaran,*
*tí eina Jesus frelsa kann.*

*3. Tann vón sum birtist mær í barm,*
*sum stilla kann her sorg og harm;*
*tí Jesus mær í hjarta býr,*
*hans frelsa er mær sæl og dýr.*

*4. Gud havi lov, for Jesu blóð,*
*av grøvini í dýrd upp stóð;*
*hann sigur vann á Sátans makt,*
*tí er alt honum undirlagt.*

*5. Mín longsil er nú heim til tín,*
*eg fái frá tær brúðarlín;*
*tú livir og eg liva skal,*
*mín sál er frelst og frí og sæl.*

*6. Ímillum frelst og hørpuspæl,*
*har syngja øll so glað og sæl;*
*í himmiríki er vár búð,*
*har fáa vit øll dýrdarskrúð.*

(Yrktur: 13. mars 2011)